## DAGSINS MEINING

# Globalisering og útbúgving

Í seinastuni hevur verið tosað nógv um globalisering, har serliga hevur verið fokuserað uppá vinnu og handil. At heimurin gerst minni dag fyri dag er ein sannroynd, ið vit mugu laga okkum eftir. Henda tillaging má ikki bara henda í vinnuni, men so sanniligani eisini innan tað almenna, og útbúgvingarpolitikkur má tillagast veruleikan, sum hann sær út í Føroyum anno 2005.

Tað er í fínasta lagi, at vinnulív brynjar seg til møguleikarnar og vansarnar, ið globaliseringin hevur við sær, men tað nyttar ikki nógv, um vit halda fram við at hava eina skipan, ið favoriserar danskar útbúgvingar og danskar umsitingarmannagongdir.

Hetta merkir, at vit skulu góðtaka gradir á líka fót við danskar, tá størv skulu setast í m.a. umsitingini. Man hevur fyrr sæð, at normerað lesnaðartíð hevur havt ávirkan á hvørja løn, ein nýansettur fulltrúi hjá landinum fær. Hetta er burtur úr vón og viti, tí ein Bachelor ella Masters grad frá einum universiteti úr Fraklandi, Týsklandi, USA, Stórabretlandi ella, fyri tað, Singapore stendur einki aftanfyri eina danska grad, og merkir ein styttri normerað tíð í flestu førum, at hesi fólk bert hava havt eina strammari lesiplan, enn í Danmark. Um so er, at onkur "kiksari" er við onkrari grad, ið ikki er nýtilig í Føroyum, so verða starvsfólk ivaleyst leypandi vigað í okkara umsiting, at slíkt skjótt verður uppdagað, og so kann man rætta mistakið.

Ikki tí, at tað er nakað galið við donskum útbúgvingum sum so, útyvir at donsk lesandi statistiskt sæð brúka longri tíð um útbugvingarnar enn í grannalondunum og eru millum tey elstu í heiminum, tá ið tey eru liðug. Danskar útbúgvingar standa helst einki aftanfyri so nógvar aðrar, men um Føroya land skal kunna beganga seg í heiminum í víðastu merking, so er neyðugt við fólki, ið hevur fjølbroytta bakgrund. Tað má ikki verða so, at øll hava somu gradir úr somu londum.

Arbeiðið, sum altjóða skrivstovan undir Mentamálaráðnum ger, er tí sera virðismikið. Tað fer av søguligum orsøkum helst at verða so nógv ár framyvir, at flestu føroyingar taka víðari útbúgvingar í Danmark. Hetta er økonomiskt skilagott og liggur væl fyri málsliga, men arbeiðið, sum m.a. verður gjørt undir Mentamálaráðnum at fáa føroyingar út í heimin at lesa, kann koma at merkja nógv fyri okkum í framtíðini. Tað er umráðandi, at vit uppá sikt koma at hava fólk við gradum úr fleiri londum í hvørjum einasta armi av okkara almenna apparati. Hetta vil stimbra fakligt kjak og vil forða fyri einsáttaðari tulking av gongdini og meira týdningarmikið vil hetta forða fyri ókritiskari lógar- og kunngerðarkopiering, sum vit tíverri síggja ov nógv av í hesum døgum. Vit eiga at minnast til, at ein útbúgving úr einum ávísum landi ikki bert umfatar tað reint tekinska, men eisini mátan at hugsa uppá og umsita uppá.

Fyrsta stig í hesum er, at man beinir alt burtur, sum beinleiðis forðar fyri javnsetan millum gradir úr ymiskum londum, so at t.d. ein Masters grad frá Cambridge ella Oxford verður javnsett við eina Masters úr Keypmannahavn ella Roskilde. Eingin verður verri fyri av javnsetan, og tað er umráðandi at tyssið av ungdómi, ið skal taka við í hesum landinum, uppá sikt verður so fjølbroytt sum gjørligt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Akstovan

**Heri Mohr**



Í bløðunum í seinastu viku svaraði Jákup Jacobsen, stjóri, upp á nakrar spurningar, sum eg hevði sett í einum lesarabrævi um tað nýggja navnið Akstovan, sum Bileftirlit Føroya hevði fingið.

Fyrst fari eg at takka stjóranum fyri skjótt og ruddiligt svar. Serliga fegin eri eg um aftursvar tygara, tí hetta er fyrstu ferð, eg fái svar upp á tað nógva, eg havi skrivað samfelagnum viðvíkjandi.

Tygara greiða svar gevur mær orsøk til nakrar sveimandi viðmerkingar.

Fyrst er at siga, at nøvnini á nøkrum "stovum", sum tygum nevna, eru ikki heilt røtt:

Hagstovan eitur Hagstova Føroya, tollstovan eitur Toll-og Skattstova Føroya, gjaldstovan eitur Føroya Gjaldstova, meðan Búnaðarstovan er ikki at finna í telefonbókini.

Eins og orðið ílat kann sigast at vera eitt hugtak, ber eisini til at siga, at orðið akfar er eitt hugtak. Orðið ak einsamalt merkir tó eitt, ið darlar aftaná.

Úti í rúmdini ferðast nøkur før um jarðarknøttin: Rúmdarstøð, rúmdarfør og fylgisveinar; hesi før hvørki koyra, aka, sigla ella flúgva. Tey ferðast.

Í luftini eru flogfør; meðan tey eru í luftini flúgva tey, men á jørðini koyra tey; tey aka ikki.

Á landi eru nógv ymisk akfør. Vit tosa um tey mekanisku og tey ikki mekanisku; og vit tosa um tey, sum koyra og tey, sum aka. Tey, sum koyra, hava øll hjól: Bilar, bussar, súklur v.m.; og tey, sum aka, hava vanliga skinnarar til at aka, skreiða á: Sletur, sparkarar. skoytur v.m.

Á sjónum eru eisini før: Skip, bátar v.m.. Øll hesi før sigla.

Aftur til akførini á landi. Akstovan (bileftirlitið) umsitur: Sýn og skráseting (nummarplátur) av akførum, eftirlit, koyrikort og vektgjald, (havi eg gloymt nakað, er tað ikki við vilja).

Øll hesi øki hava samband við akfør, ið koyra; eingi av teimum aka, - uttan í speirekandi týdningi. Niðurstøðan má tí verða, at um tað gamla, roynda navnið, Bileftirlit Føroya, neyðturviliga skal broytast, so hevði **Føroya Koyristova** verið eitt navn, sum øll høvdu skilt.

Á koyristovuni er nógv virksemi, og viðberingin er ovurhonds stór: Øll, ið hava koyrikort ella annað **koyri**loyvi, øll, ið gjalda vektgjald fyri akfør, ið **koyra** á vegunum, **koyri**óhøpp í ferðsluni, **koyri**skúlar, **koyri**lærarar, **koyri**royndir o.s.fr.

Lítið sigandi navnið **Akstovan** - úttalast akkstovan - er, bílætliga sagt, mest sum ein málslig torso.

Umhugsið tað nýggja stovnsnavnið av nýggjum, meðan tíð er.

# Góðtaka ikki framferðarhátt hjá samgongulimi

**John William Joensen**
*Norðoya Sambandsfelag*



Norðoya Sambandsfelag mótmælir at samgongulimur slapp at halda samgonguni gísla og harvið beinleiðis stuðla avbyrgingini av norðoyggjum undir verkfallinum.

Tað má vera minstakarv til samgongulimir at teir vísa ábyrgd yvir fyri øllum landinum og harvið røkja sína skyldu sum stjørnar limur hjá føroysku tjóðini.

Støðan seinastu vikuna var hættislig, serliga um leirvíksfjørð, og tí var tað ein stór skomm at javnaðarmaður valdi at taka lokal áhugamál hjá sínum veljarum í høvusstaðnum fram um tørvin hjá norðoyingum, suðuroyingum, sandoyingum og útoyggjunum.

Hetta kann avgjørt ikki loyvast og fer Norðoya Sambandsfelag at heita á Javnaðarflokkin um at seta viðkomandi tingmann uttanfyri alla ávirkan á politikkin hjá samgonguni um hesin ikki velur at broyta kós.

Ágangurin á útjaðaran er stórur eisini í hesum døgum og tí kann støðan, sum førdi til at stjørn landsins var handlings lammað, meðan landið var í kreppu, ikki endurtaka seg.

Um Javnaðarflokkurin ikki megnar at rudda upp í egnum húsið verður tað eitt álvarsligt bakkast fyri álitið hjá Føroya fólki á at hendan samgonga hevur rygg til at finna loysnir tá á stendur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.